## Pávin viðurkennir Galileo

Lokains hevur tann katólska kirkjan viðurkent tann kenda italska stjørnufrøðingin Galileo. Tað hendi um vikuskiftið í sambandi við, at 400 ár eru liðin, síðani Galileo gjørdi sínar fyrstu rannsóknir við stjørnukikaranum. Her nýtti Benedikt pávi høvi til at siga, at við at skilja náttúrulógirnar hava fólk lættari við at skilja verk Guðs. Í 1992 segði táverandi pávin, Jóhannes Páll Annar, at tað var eitt mistak av katólsku kirkjuni at fordøma Galileo. Í sínum kanningum kom Galileo eftir, at tað er jørðin, sum melu rundan um sólina og ikki øvugt, og tað samsvaraði ikki við læruna hjá kirkjuni í 17. øld.



*Benedikt pávi viðurkennir Galileo*

*Mynd: AP*

## Illveður tarnar jólaferðsluni

Har norðuri í USA hava fleiri túsund amerikanarar hava ligið veðurfastir teir seinastu dagarnar, tí illveður við kavaroki hevur tarnað bæði flogferðsluni og bussferðsluni. Við býin Seattle í útnyrðingshorninum á landinum er nógvur kavi komin niður, og í floghavnini hava fleiri túsund fólk sitið ella ligið og bíðað eftir at sleppa á flog. Í floghavnini O'Hare í Chicago, sum er ein tann største í heiminum, vórðu 150 fráferðir avlýstar í gjár, og í New York og Boston har eysturi í landinum var flogferðslan nógv seinkað av veðrinum.

# Bíligast í Fugloy og dýrast á Tvøroyri

**Skalt tú velja tær bústað í Føroyum, er bíligast at búseta seg í Fugloy og dýrast at búseta seg á Tvøroyri**

LIVIKOSTNAÐUR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað er rættiliga stórur munur á, hvat tað kostar at búgva í teimum ymsu kommunum í Føroyum.

Tað vísir eitt yvirlit yvir skattaprosentið og barnafrádráttin í teimum ymsu kommununum fyri næsta ár, sum Portalurin hevur fingið.

Og tað er ongin ivi um, at tann, sum vil búgva bíliga, skal flyta til Fugloyar Kommunu, tí har er bæði lægsti kommunuskattur og hægsti barnafrádráttur í Føroyum.

Skatturin í Fugloy næsta át verður 16% og barnafrádrátturin er heilar 7000 krónur og tað er tað sama, sum í ár.

Tað er bara Skúvoy, sum hevur líka lágan skatt upp á 16% næsta ár, men har er barnafrádrátturin 3000 krónur.

Heilt øðrvísi sær út á Tvøroyri, tí har verður skattaprosentið næsta ár 23,5% og tað er hægsta skattaprosent í landinum. Á Tvøroyri er barnafrádrátturin 5000 krónur.

Tað er ein onnur kommuna, sum hevur toppskatt næsta ár upp á 23,5%. Tað er Sandoy, men har er barnafrádrátturin 6000 krónur, ella 1000 krónur meiri enn á Tvøroyri. Bæði á Tvøroyri og á Sandi er skatturin og barnafrádrátturin tann sami næsta ár sum í ár.

Annars er sæst á uppgerðini, at tað eru tær smáu kommunurnar, sum hava lægsta skattaprosentið.

Í Kunoy verður skattaprosentið 18% næsta ár, men har er tað hækkað 2% afturímóti í ár og tað er størsta hækkingin av øllum kommunum. Barnafrádrátturin er tann sami upp á 4000 krónur. Eisini í Húsum verður skattaprosentið 18% næsta ár og barnafrádrátturin 6000 krónur og tað er tað sama sum í ár og í Fámjin verður tað eisini 18% og har barnafrádrátturin 5.500 krónur og tað er alt óbroytt frá í ár.

Í miðal verður skattaprosentið 20,78% næsta ár og barnafrádrátturin 4821 krónur næsta ár. Tað merkir at miðalskatturin hækkar 0,13% og barnafrádrátturin 74 krónur afturímóti í ár.

| Kommunuskattaprocent 2009: | | | | 2008: | | | Munur | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Komm.s | Kirkjusk. | Barnafr. | Komm.s | Kirkjusk. | Barnafr. | Komm.s | Kirkjusk. | Barnafr. |
| Fugloyar | 16,00 | 0,60 | 7.000 | 16,00 | 0,60 | 6.500 | | | 500 |
| Viðareiðis | 20,50 | 0,60 | 4.000 | 20,50 | 0,60 | 3.500 | | | 500 |
| Hvannasunds | 20,10 | 0,60 | 5.000 | 20,10 | 0,60 | 3.500 | | | 1.500 |
| Klaksvíkar | 21,75 | 0,60 | 4.000 | 20,75 | 0,60 | 4.000 | 1,00 | | |
| Kunoyar | 18,00 | 0,60 | 4.000 | 16,00 | 0,60 | 4.000 | 2,00 | | |
| Húsa | 18,00 | 0,60 | 6.000 | 18,00 | 0,60 | 6.000 | | | |
| Fuglafjarðar | 21,50 | 0,60 | 4.000 | 21,50 | 0,60 | 4.000 | | | |
| Eystur | 21,00 | 0,60 | 5.000 | 20,50 | 0,60 | 5.000 | 0,50 | | |
| Nes | 20,50 | 0,60 | 5.000 | 20,50 | 0,60 | 5.000 | | | |
| Runavíkar | 22,00 | 0,90 | 4.000 | 22,00 | 0,90 | 4.000 | | | |
| Sjóvar | 21,50 | 0,60 | 4.500 | 21,50 | 0,60 | 4.500 | | | |
| Eiðis | 20,00 | 0,60 | 5.000 | 19,50 | 0,60 | 5.000 | 0,50 | | |
| Sunda | 20,60 | 0,60 | 5.000 | 20,60 | 0,60 | 5.000 | | | |
| Kvívíkar | 21,00 | 0,60 | 4.000 | 21,00 | 0,60 | 4.000 | | | |
| Vestmanna | 22,00 | 0,60 | 4.000 | 22,00 | 0,60 | 3.500 | | | 500 |
| Vága | 20,80 | 0,60 | 4.000 | 20,50 | 0,60 | 4.000 | 0,30 | | |
| Sørvágs | 20,50 | 0,60 | 4.000 | 20,50 | 0,60 | 4.000 | | | |
| Sands | 23,50 | 0,60 | 6.000 | 23,50 | 0,60 | 6.000 | | | |
| Skopunar | 22,50 | 0,60 | 6.000 | 22,50 | 0,60 | 6.000 | | | |
| Skálavíkar | 21,00 | 0,60 | 4.000 | 21,00 | 0,60 | 3.000 | | | 1.000 |
| Húsavíkar | 21,00 | 0,60 | 5.000 | 21,00 | 0,60 | 5.000 | | | |
| Skúvoyar | 16,00 | 0,60 | 3.000 | 16,00 | 0,60 | 3.000 | | | |
| Hvalbiar | 20,00 | 0,60 | 3.000 | 20,00 | 0,60 | 3.000 | | | |
| Tvøroyrar | 23,50 | 0,60 | 5.000 | 23,50 | 0,60 | 5.000 | | | |
| Fámjins | 18,00 | 0,60 | 5.500 | 18,00 | 0,60 | 5.500 | | | |
| Hovs | 20,00 | 0,60 | 5.000 | 20,00 | 0,60 | 4.000 | | | 1.000 |
| Porkeris | 21,00 | 0,60 | 4.000 | 21,00 | 0,60 | 3.000 | | | 1.000 |
| Vágs | 23,25 | 0,60 | 4.000 | 23,25 | 0,60 | 4.000 | | | |
| Sumbiar | 21,00 | 0,60 | 5.000 | 21,00 | 0,60 | 5.000 | | | |
| Tórshavnar | 19,75 | 0,70 | 5.500 | 19,75 | 0,70 | 5.500 | | | |
| Hægsta | 23,50 | 0,90 | 7.000 | 23,50 | 0,90 | 6.500 | 0,00 | 0,00 | 500 |
| Meðal | 20,78 | 0,66 | 4.821 | 20,65 | 0,66 | 4.746 | 0,13 | 0,00 | 74 |
| Lægsta | 16,00 | 0,60 | 3.000 | 16,00 | 0,60 | 3.000 | 0,00 | 0,00 | 0 |

*Her sæst, hvussu nógv tað kostar at búgva í tínari kommunu næsta ár, aftur ímóti í ár*



# Leitingin eftir Honnu Christophersen steðgað

**Fríggjakvøldið gav løgreglan upp at finna hana**

LEITING

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin*

*Hóast tey hava leitað alla hugsandi staðni, eydnaðist ikki at finna Honnu Christophersen. Men hóast skipaða leitingin er endað, heitir løgreglan á fólk um at hava eyguni við sær eftir henni*

Løgreglan steðgaði fríggjakvøldið teirri skipaðu leitinginieftir Honnu Christophersen úr Vestmanna.

Síðani seinnapartin týsdagin varð leitað miðvíst eftir 78 ára gomlu Honnu.

Men tað gav onki úrslit og fríggjakvøldið hava løgreglan, sløkkiliðið í Vestmanna og tey avvarðandi í samráð gjørt av at steðga teirri skipaðu leitingini, sigur sýslumaðurin Andras Marr Poulsen.

Bæði sløkkiliðið í Vestmanna og í Kvívík, bjargingarfeløgini í Vágum og Havnar Bjargingarfelag, hava leitað alla hugsandi staðni eftir kvinnuni, men til fánýtis.

Leitað var í Vestmanna og har um leiðir, men síðani ábendingar vóru komnar um, at Hanna hevði leitað sær til Havnar, varð eisini leitað alla møguliga staðni í Havn, í Hoyvík, á Hvítanesi og á Argjum.

Hóast skipaða leitingin er steðgað, heitir løgreglan framvegis á fólk um at hava eyguni eftir Honnu og um at seta seg í sambandi við løgregluna á telefon nummari 35 14 48, skuldi onkur varnast okkurt.

Hanna Christophersen er lítil á vøkstri, ikki meiri enn 150 sentimetrar, og klæntraslig. Hon var í myrkabláum ella svørtum jakka, sum er í størra lagi til hana og í myrkum skóm. Hon hevur gráhærd, hevur grá-blá eygu og gongur vanliga í brillum.

Leggjast kann afturat, at hon er minnisveik.

Samstundis sum løgreglan gavst at leita, takka tey øllum, sum hava verið við í leitingini.

Hóast skipaða leitingin er var hildin uppat, vóru sjálvboðin í hópatali við bátum og leitað í Vestmannafirði eftir Honnu.